

Eli saman við sínum bjargingarmanni Óla, sum átti sín leiklut, tá ið Jón Baldvinsson fór á land

## Bjargingarbátarnir fórust

Skiparin gav eisini beinan vegin boð um, at seta bjargingarbátarnar út, hóast tað var ringt at síggja, hvussu hetta kundi vera nøkur bjarging, sum støðan var.

Vit gjørdu sjálvandi eftir boðunum frá skiparanum, og fóru í holt við at seta bjargingarbátarnar út. Tá kom eitt stórt brot sum legði alt afturskipið undir. Tíbetur høvdu menninir varnast tað og lupu inn á brúnna. Tá ið manningin skuldi fara aftur til bjargingarbátarnar vóru báðir burturi.

Eg kann siga at Gud havi lov fyri, at bjargingarbátarnir vóru burturi! Vóru vit farnir í bátarnar hevði óivað okkurt av stóru brotunum koppað ella brotið bátarnar sundur, og allir høvdu sjólátist.

## Stjóraðir í land

Tá ið skipið fyltist aftan og byrjaði at søkka, gav skiparin boð um, at manningin skuldi fram á bakkan. Vit hildu okkum í veirin sum var spentur millum brúnna og bakkan, og sum deksljósini hingu í. Allir komu fram í øllum góðum og eingin serligur fjáltur var á monnunum. Myrkt var, tí tað var nátt, og harafturat slóknaðu motorarnir skjótt, tí sjógvur kom í maskinrúmið.

Vit síggja tá, at skipið stendur heilt uppi í fjøruni við gronini langt burtur úr sjónum. Vit høvdu eina byrsu umborð, sum kundi skjóta eina bjargingarlínu upp á land. Tá ið bjargingarfelagið úr Grindavík, sum var nærmasta bygd, kom á staðið klokkan 07.00, skutu teir línuna upp á bakkan, og stjóringin av monnunum kundi byrja. Bjargingarútgerðin var góð, og bjargingin gekk væl, tí kl. 09.45 vóru allir 42 menninir komnir upp á bakkan í øllum góðum. Tá ið vit komu uppá bakkan, stóð "gamli" skiparin fyri okkum. Hann hevði frætt um neyðarkallið og hevði koyrt beinan vegin úr Reykjavík og út á Reykjanes.

Úti á Reykjanesi var bara eittans hús, og har búði fýrpassarin. Hann var blíður og bjóðaði ein heitan drekkamunn, hóast húsið var fult av monnum.

## Sama stað sum Anna

Fýrpassarin segði tá frá eini hending, tá ið hann var smádrongur. Hann og pápin, sum eisini



Hetta er vitin og vitahúsini á Reykjanesi. Higar kom manningin, tá ið hon var bjargað

var fýrpassari, vóru farnir ein gongutúr gjøgnum fjøruna, har sum Jón Baldvinsson nú stóð. Tá gingu teir seg fram á saltfisk. Tá segði pápin, at her er óivað eitt føroyskt skip farið á land. Tá ið teir løtu seinni gingu seg fram á lík, fór pápin heim við honum. Hetta gloymdi hann ikki. Pápin boðaði so myndugleikunum frá og fekk so hjálp til at taka fleiri lík upp úr fjøruni. Tað vísti seg seinni, at menninir vóru av sluppini Annu, av Toftum, sum var farin á land á somu leið sum Jón Baldvinsson, og var hetta í 1924, tá ið seytjan mans umkomust. Fjúrtan teirra vórðu grivnir í kirkjugarðinum í Reykjavík, sum fyrr hevur verið greitt frá í Sosialinum.

## Kendur aftur frá fyrra skipbroti

Løtu seinni kom bilur úr Grindavík eftir manningini. Í Grindavík fingu vit góða móttøku, og eina góða máltíð, áðrenn leiðin gekk til Reykjavíkar, har føroyingarnir fingu innivist á gistingarhúsi.

Tað eina kvøldið bjóðaði bjargingarfelagið í Reykjavík manningini á Jón Baldvinsyni til ein hugnaløtu. Fólkini vóru sera blíð. Tá kom ein kona til mín, tók um hálsin á mær og segði: "Tú ert ikki aftur her?" Hon kendi meg aftur frá skipbrotinum við Havfrúnni í 1947.

Nakað seinni komu føroyingarnir heim við einum íslendskum trolara.

## Eli Petersen var eisini við Jón Baldvinsson

Í 1999 var nevndin í fiskimannafelagnum á kunningarferð í Íslandi. Ein partur av ferðina var eitt minningarhald fyri teir, sum fórust við sluppini Onnu á Toftum.

Við í ferðalagnum var Eli Petersen, ættaður úr Kvívík, sum eisini var við Jón Baldvinsson.

Minningarhaldið var í gamla kirkjugarðinum í Reykjavík, har manningini er grivin. Ein partur av minningarhaldinum var ein ferð til plássið, har Anna fór á land við Grindavík.

Frásøgumaðurin í Grindavík kallaðist Óli, og hann kundi peika júst á staðið, har henda vanlukkan hendi.

Tá vísti tað seg, at júst hesin sami Óli hevði verið ein oddamaður í bjargingini av manningini á Jón Baldvinssyni, og tá kom Eli at hitta sín bjargingarmann. Tað var ikki løgið, um teir fingu nakað nógv at práta um. Óli var tá bert 19 ára gamal. Men sum røktingarmaður á hesum leiðum var hann staðkendur, og tað var ikki minst honum fyri at takka, at teir funnu skipið í mjørkanum í tí ilsliga veðrinum.

Sjómannafelagið bjóðaði ein

í øllum góðum fram á bakkan. Íslendingurin takkaði Eli, sum hann segði eiga lívið í sær.

Bjargingarstólurin var ein bjargingarkransur, sum var riggaður sum ein stólur. Tað var ikki heilt lætt at stjóra menninar í land, tí bergið uppfyri var einar 40 metur høgt. Tað var strævið hjá teimum, sum vóru uppi á eggini. Men so



Hetta er ein byrsa at skjóta bjarginalínu umborð í skip eins og við Havfrúnni og Jón Baldvinsson. Jógvan í Løðuni tók hesa myndina á Siglufirði í 1986

bita hendan dagin, og tá nýtti Eli høvið til at handa bjargingarfelagnum í Grindavík ein borðbát, sum hann sjálvur hevði smíðað, sum eina tøkk fyri hesa bjarging.

FF-blaðið hevði í 2000 eina frásøgn frá Eli um, hvussu hann upplivdi hesa hending, og fara vit at endurtaka nakað av henni. Um tá ið skipið stoytti sigur Eli, at hann var einsamallur á dekkinum í hesi løtu og fekst við at sjekla weirin í trollemmin. Einir 10 føroyingar og fleiri íslendingar vóru frammi í lugarinum. Teir komu allir upp við tað sama og fóru aftur á bátadekkið.

So hvørt tað fløddi og sjógvarnir brutu upp á bátadekkið, noyddust teir, sum høvdu verið harafturi at passa sær løgir og sleppa sær fram á bakkan at standa, tí verandi var ikki á bátadekkinum. Sum tíðin leið fóru eisini nakrir teirra, sum høvdu staðið í stýrihúsinum fram á bakkan. Men pláss var ikki fyri øllum á bakkanum í senn. Nakrir vóru tí noyddir at vera eftir í stýrihúsinum, til teir fyrstu vóru farnir av skipinum.

Ein 72 ára gamal íslendingur og Eli, sum tá var 27 ára gamal, vóru teir seinastu av bátadekkinum og fram á bakkan, men tá vóru framvegis nakrir menn eftir í stýrihúsinum. Aldurnar brutu nú fram yvir skipið, og tá ið teir skuldu skunda sær fram eftir dekkinum, gjørdist íslendingurin fastur í netinum, sum lá á dekkinum.

Sum góður trolmaður og fiskimaður hevði Eli dolkin í slíðranum. Áðrenn næsta brotið hálvdi seg inn yvir skipið, hevði Eli skorið hann leysan, og teir sluppu

hvørt menninir komu í land, hjálptu teir til, og hetta lætti nógv um.

Skiparin og stýrimaðurin skipaðu fyri í hvørji raðfylgju menninir skuldu koma í land. Fyrst fóru teir elstu menninir, síðan skiftivís ein føroyingur og ein íslendingur. Sjálvur var Eli nummar 38. Hann sat uppi á ankarspælinum, tá ið hann átti tørn. Hann noyddist at leypa í stólin, tí nú skolaðu brotini framyvir skipið og framyvir bakkan.

Seinastur at fara í land var skiparin sjálvur. Øll bjargingin tók einar fýra tímar.

Øll manningin fór fyrst niðan til vitapassaran, sum hevði svág á Eiði, nevnliga Olaf Samuelsen, og síðan varð farið til Grindavíkar.

Sagt verður, at hetta var bjarginging av tí størsta talinum av fólki, sum hevði verið í eini vanlukku Íslandi.

Føroyingarnar ið við vóru: Tórhallur Andreassen, Sámal J. Petersen, Eli Petersen, Sørin Olsen, Hans J. Hansen, Páll J. Djurhuus, Edmund Vang, Eyðálvur Johannesen, Theodor Johannesen, Erik Olsen, Marni Olsen, Einar Olsen og Jógvan A. Poulsen.

**Komandi partur**
Í komandi parti gerst Tórhallur skipari, og tað lá eisini væl fyri hjá honum at fiska.